ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Obama hevur alt, sum er neyðugt, fyri at tað skal bera til at gera ein rossahandil við hann*

*(Silvio Berlusconi)*

# »Rahmbo« verður høgra hond hjá Obama

**Avgerðin hjá Barrack Obama at tilnevna Rahm Rmanuel umsitingarleiðara í Hvítu Húsunum fekk góða móttøku í Ísrael, men arabar halda lítið um tað valið**



*Tann 48 ára gamli Rahm Emanuel bleiv afturvaldur í Umboðsmannatingið týsdagin, men skal nú í Hvítu Húsini ístaðin fyri (Mynd: Polfoto)*



*Robert F. Kennedy kann blíva ráðharri 40 ár eftir, at pápi hansara bleiv myrdur í valstríðnum í 1968 (Mynd: AP)*

Ísraelska blaðið Maariv duldi ikki fyri, hvat blaðið helt um mannin, sum verður høgra hond hjá nýggja forsetanum.

– Rahm Emanuel er okkara maður í Hvítu Húsunum, skrivaði blaðið. Sum leiðari fyri umsitingini fær hann ikki beinleiðis uttanríkispolitiska ávirkan, men hansara góða samband við Ísrael hevur elvt til stúran millum palestinar, skrivar AP.

Rahm Emanuel, sum ber orð fyri at vera avgjørdur og hvassorðaður og hevur fingið eyknevnið ”Rhambo”, er sonur ein jødiskan lækna, sum var limur í jødiska undirgrundarfelagsska pinum Ingun í 1930- og 1940-árunum. Felagsskapurin bardist fyri einum sokallaðum Stór-Ísrael og skipaði fyri fleiri atsóknum at palestinskum og bretskum málum í Palestina.

Rahm Emanuel er bæði amerikanskur og ísraelskur ríkisborgari, og hann hevur ongantíð dult fyri, at hann kennir seg knýttan at Ísrael.

- Tað sigur seg sjálvt, at hann fer at royna at ávirka forsetan til at reka ein vinarligan politikk mótvegis Ísrael, sigur pápi Rahm Emanuel við Maariv.

Hinvegin skrivar tíðindatænastan Electronic Intifada, sum stuðlar palestinskum sjónarmiðum, at avgerðin hjá Obama at velja sær Rahm Emanuel til umsitingarleiðara man vera eitt vónbrot fyri tey, sum høvdu vónað, at tann komandi forsetin fór at víkja frá tí Ísrael-vinarliga politikkinum hjá Bush-stjórnini.

Í USA verður framvegis dúgliga gitt, hvør skal mynda stjórnina hjká Barrack Obama. Nøvn sum John Kerry, Al Gore og Colin Powell eru ofta at hoyra, og summi vilja eisini vera við, at Hillary Clinton kann enda sum heilsumálaráðharri.

Eitt kent eftirnavn, sum spøkir í fleiri fjølmiðlum, er Kennedy. Summir eygleiðarar halda, at Barrack Obama kann senda boð eftir Robert F. Kennedy Jr. og bjóða honum starvið sum umhvørvismálaráðharri.

Systkinabarn hansara Caroline Kennedy verður eisini umrødd í fjølmiðlunum, tí fleiri halda, at hon kanska verður amerikanskur ST-sendiharri.



*Eliot Spitzer og konan Silda á tíðindafundinum, tá hann viðgekk at hava vitjað skøkjur regluliga (Mynd: AFP)*

# Sleppur undan ákæru

**Fyrrverandi guvernørurin í New York verður ikki ákærdur fyri at hava keypt sær tænastur frá skøkjum**

**Ákæruvaldið í New York hevur gjørt av at sleppa skuldsetingini ímóti fyrrverandi guvernørinum Eliot Spitzer, sum fyrr í ár bleiv skuldsettur fyri at hava keypt sær tænastur frá skøkjum fyri almennar pengar.**

**Ákærin Michael Garcia sigur, at ákæruvaldið hevur ikki funnið nakað prógv fyri, at guvernørurin rindaði við almennum pengum, og tí hevur málið ikki almennan áhuga, sigur hann við AFP.**

**Eliot Spitzer noyddist frá sum guvernørur í New York, tá blaðið New York Times avdúkaði, at hann reguliga keypti sær tænastur frá skøkjum í býnum. Hevði hann komið fyri rættin og fingið dóm, kundi hann fingið upp í fimm ára fongsul.**



# Húsavirðið í Íslandi kann fella 40 prosent

**Íslendski tjóðbankin roknar við, at húsavirðið í Íslandi kann fella meiri enn 40 prosent trý tey næstu árini**

Heldur metingin hjá bankanum, merkir tað, at í 2011 verður húsavirðið í Íslandi bara helmingin av tí, sum tað var í 2007, tá tað var upp á tað mesta, skrivar Morgunblaðið. Fallið er størri, enn tjóðbamnkin upprunaliga hevði roknað við, men trong fíggjarlig kor hjá fólki og fráflyting trýsta virðið longri niður enn upprunaliga mett.

Tjóðbankin væntar, at privata nýtslan verður umleið 7,5 prosent minni í ár enn í fjør, at at minkingin verður heili 25 prosent næsta ár. Seint í 2010 fer at ganga hinvegin, og meting bankans er, at tann privata nýtslan fer at økjast 10 prosent í 2011, og at økingin verður uppaftur størri í 2012.

Skuldin hjá teimum íslendsku húsarhaldunum veksur eisini. Tann 30. juni í ár var hon 3.770 milliardir íslendskar krónur, og tað var 200 milliardir meiri enn seinasta ársskiftið, sigur tjóðbankin.

## STUTT SAGT

### Vildu eiga minniligt blað

Sjáldan hevur eftirspurningurin eftir amerikonskum dagbløðum verið so stórur sum mikudagin, tí nógvir amerikanarar vildu fegnir ogna sær eitt eintak av bløðunum, tí Barrack Obama stóð á hvørjari forsíðu umframt nógvastaðni inni í bløðunum.

Eitt nú skrivar tíðindastovan AP, at umleið 400 fólk stóðu í einari langari røð uttan fyri høvuðsskrivstovuna hjá Washington PostMá þar nefna að 400 manns biðu í röð , tí fólk vildu tryggja sær eitt eintak av mikudagsblaðnum, sum var útselt í blaðsølunum eftir einari løtu.

New York Times gjørdi av at prenta 35 prosent fleiri eintøk av mikudagsblaðnum, men kortini noyddist prentsmiðjan at prenta 75.000 eintøk afturat, tá saman um kom. Í Chicago, sum er heimbýur hjá Barrack Obama, varð blaðið The Chicago Sun-Times útselt, so prentsmiðjan mátti prenta eitt upplag afturat.

Sjónvarpið CNN upplýsti, at umleið 30 milliónir fólk høvdu vitjað heimasíðuna hjá felagnum valdagin, og tað er met.

### Gamal hermaður deyður

Nú um dagarnar doyði bretin Maurice Lucas 108 ára gamal sum ein av teimum seinastu, sum var hermaður í fyrra heimsbardaga.

Maurice Lucas, sum var føddur í enska býnum Leicester tann 21. september í 1900, var bara 17 ára gamal, tá hann bleiv boðsendur at gera tænastu í bretska herinum í fyrra heimsbardaga. Tað var í 1918 ella sama árið, sum kríggið endaði, og Maurice Lucas var ongantíð í veruligum bardaga undir krígnum.

Hann bleiv eisini kallaður inn í bretska herin undir seinna heimsbardaga, men orsakað av heilsuávum bleiv hann frítikin fyri hertænastu í 1941, áðrenn hann yvirhøvur kom í bardaga. Tískil var hann innkallaður í báðum heimsbardøgunum uttan at vera í bardaga.